# ri allar pengarnar

orkestrum í heiminum til dømis symfoniorkestrinum í Santa Pætursborg.

Hann loyvdi nøkrum av børnunum at stjórna symfoniorkestrinum, og tað hildu børnini vera sera stuttligt.

– Tað ráddi um at fáa børnini at luttaka aktivt við í konsertini, og tað haldi eg eydnaðist við, at tey sluppu at royna seg sum dirigentar og so sjálvandi felagssanginum eisini, greiðir Poul Jákup frá.

### Vekja áhugan

Høvuðsendamálið aftan fyri hesar konsertirnar er at vekja áhugan hjá børnum og ungum fyri klassiska tónleikinum. Og at læra tey at lurta eftir tónleikinum, so tey kunnu síggja tann stóra dýrgripin, ið liggur í tónleikinum. Eisini tí klassiska.

Poul Jákup sigur, at Føroya Symfoniorkestur skal vera fyri øll. Hann greiðir frá, at konseptið við familjukonsertini er nakað tað sama sum við árligu nýggjársnkonsertini. Har er tað eydnast orkestrinum at fáa eyguni hjá fólki upp fyri, at eitt symfoniorkestur sanniliga eisini kann spæla lættan og undirhaldandi tónleik – umframt tey meira tungu og klassisku verkini.

– Við nýggjárskonsertini bleiv greitt fyri teimum, ið kanska ikki dáma so væl tann tunga klassiska tónleikin, at Føroya Symfoniorkestur er annað enn bara tað, staðfestir Poul Jákup og leggur afturat, at tað letur til, at børnini eisini kunnu síggja tað nú í kjalarvørrinum av fyrstu familjukonsertini.

Orkestrið er so mikið vælnøgt við fyrstu konsertirnar, at fastlagt er longu, at konsertirnar verða aftur í 2005.

– Vit hava longu bílagt bæði Norðurlandahúsið og ítróttarhøllina í Runavík, sigur hann brosandi.

Teirra vón er, at konseptið við familjukonsertini fer at verða eitt ískoyti til at skapa jólahýrin.

### Positivur hugburður

Formaðurin í Føroya Symfoniorkestri sigur, at tað var leikandi lætt at skipa fyri konsertunum, tí hugburðurin bæði í Norðurlandahúsinum og frá Runavíkar kommunu var so positivur.

Norðurlandahúsið er ein konsertsalur, so har skal ikki so øgiliga nógv til fyri at skapa røttu karmarnar, meðan tað kann vera torført í einari ítróttarhøll. Poul Jákup greiðir frá, at tá tey komu til Runavíkar, var alt so gott sum klárt til sjálva konsertina. Har høvdu fólk sett ljós upp og ljóðútgerð. Høllin varð prýdd, og tað setti sín dám á.



*Eyðun Johannesen las ævintýrið Snowman fyri børnunum, meðan orkestrið syrgdi fyri ljóðeffektunum*

Føroya Symfoniorkestur valdi júst Runavík sum staðið at halda ta seinnu konsertina, tí tey mettu, at tað er staðið, har møguleikin fyri at savna eina stóra fjøld av børnum uttan fyri Havnina størstur.

– Har komu børn av Eiði, Oyrabakka, Gøtu, Fuglafirði, Leirvík, ja, enntá úr Klaksvík eisini, so tað var væl mett, vil eg siga, sigur Poul Jákup.

### Enn eitt mál rokkið

Familjukonsertin var sum sagt ein liður í at vísa, at Føroya Symfoniorkestur er fyri allar føroyingar. Aðrar konsertir, sum orkestrið hevur skipað fyri í hesum sambandi, er ein Beethovenskonsert, har málbólkurin vóru ung, sum hava tónleik á miðnámsskúlunum. Tey lósu um Beethoven í skúlanum og fingu so høvi til at hoyra nøkur av verkunum hjá stóra tónaskaldinum til konsertina við Symfoniorkestrinum.

Komandi ár verður ein konsert, har solistur, kór og orkestur fara at framføra stór kórverk. Byrjað verður við Mozart Requiem, greiðir Poul Jákup frá.

– Føroya Symfoniorkestur hevur einar fimm ella seks konsertir um árið. Allar eru tær ein roynd til at vekja størri og breiðari áhuga fyri orkestrinum. Við familjukonsertini vil eg siga, at enn eitt mál er rokkið í strembanini júst eftir tí, sigur formaður Føroya Symfoniorkesturs, Poul Jákup Thomsen.

Næsta konsertin, sum liggur fyri framman hjá Føroya Symfoniorkestri, er árliga nýggjárskonsertin, sum verður tann 9. januar. 650 fólk sleppa inn til ta konsertina í Norðurlandahúsinum. Og sum skilst gongur atgongumerkjasølan sum heitt breyð.

Fólk vita, at hon verður og nær. Tey vita eisini, at gravgangur er eftir atgongumerkjunum, so tí eru tey í góðari tíð at ogna sær eitt.



*– Føroya Symfoniorkestur er fyri øll, og tí leggja vit okkum eftir at hava konsertir, sum røkka ymiskar málbólkar, sigur Poul Jákup Thomsen, formaður í Føroya Symfoniorkestri*